# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Próvhandan á Vinnuháskúlanum

**Fríggjadagin 19. desember 2008 fingu 36 næmingar prógv handað á Vinnuháskúlanum, har eini 150 fólk vóru komin saman fyri at luttaka í próvhandanini á skúlanum. Talan var um maskinmeistarar, skiparar og skipsførarar**

*Myndir: Hans J. Hansen*



***Maskinmeistarar:** Bjarki Magnussen, Leif Johannesen, Jóhan Á. Olsen, Svend J. Rasmussen, Heðin Jacobsen, Símun Kerá og Svenn M. Hansen. Virðislønir vóru lætnar: 1. Leif Johannesen, 2. Svenn M. Hansen. Ídnisvirðisløn varð latin til Símin Kerá*



***Skiparar:** Niels J. Gregersen, Bergar Hvannastein, Bjarni Góðadal, Símun Neshamar, Símun Gutti Joensen, Rókur Henryson, Páll Nielsen, John Finnur Joensen-Næs, Bárður Laksafoss, Ernst S. Magnussen, Eyðun Madsen, Finnbogi Berg, Jógvan Olsen, Leivur Thorsteinsson og Olgar Eysturskor. Virðislønir vóru lætnar: 1. Bárður Laksafoss, 2. Niels J. Gregersen og 3. Ernst S. Magnussen*



***Skipsførarar:** Áki Jensen, Bárður Jacobsen, Beinir Vestergaard, Eyðbjørn Jespersen, Óli N. Andresen, Petur S. Justesen, Bárður J. Johannesen, Aksel Mikkelsen, Andras Samson, Brandur N. Jacobsen, Hávarður Enni, Páll Tórður Thomsen, Thorbjørn Hansen og Bárður Matras Jakobsen. Virðislønir vóru lætnar: 1. Beinir Vestergaard, 2. Bárður Jacobsen og 3. Eyðbjørn Jespersen*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Olivar Reinert** úr Syðradali, búsitandi í Sorø, andaðist á Slagelse sjúkrahúsi mánadagin 12. januar, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Nina Magnussen** fer til gravar úr Hørsholm Kirke, fríggjadagin 16. januar kl.12.00. Tey, sum vilja minnast Ninu, kunnu lata føroya cystisk fibrosa felag eina peningagávu, konto í Føroyabanka, nummar 6460-4008938

**Esther Nielsen,** fødd Petersen, ættað úr Norðragøtu, búsitandi í Gammel Holte, andaðist sunnukvøldið á Herlev Sjúkrahúsi, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Gammel Holte-kirkju leygardagin kl. 13.

**Elisabeth Bjarnason,** ættað av Tvøroyri, búsitandi í Reykjavík, andaðist leygardagin 10. januar, 60 ára gomul.

## Dagurin

**14. januar. Felix,** deyður umleið ár 260. Prestur í Nola, nærhendis Napoli í Italia. Nógvar eru frásagnirnar um hansara lítillátna lív og tær mongu undirgerðirnar hann útinti. Navnið merkir *eydnuríkur*.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma, langomma og systir

**Esther Nielsen**
fødd Petersen, ættað úr Norðragøtu, búsitandi í Gammel Holte,

andaðist sunnukvøldið, 77 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Gammel Holte kirkju leygardagin kl. 13.

*Fyri tey avvarðandi*

**Jørgen, Jannette, Tommy, Lonni og Tonny**

†

**Nina Magnussen**
ættað av Tvøroyri,
búsitandi í Keypmannahavn

andaðist á Bispebjerg Hospital leygardagin 10. januar, 48 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Hørsholm Kirke, fríggjadagin 16. januar, kl. 12.00.

Tey, sum vilja minnast Ninu, kunnu lata føroya cystisk fibrosa felag eina peningagávu, konto í Føroya banka, nummar 6460-4008938.